# Kristnir jólasiðir: Jólakalendarin

**Øll kenna jólatræið og jólahosuna, men hvar er kristna innihaldið í hesum og øðrum, ið vit knýta til jólini?**



Jólakalendarar telja dagarnar undan jólum og er ein nýggjur siður, sum ikki beinleiðis er grundaður á kristna orsøk, hóast tað at telja dagarnar til eina av ársins stóru høgtíðum altíð hevur verið gjørt, serliga um veturin, har tíðin fram móti jólum kann tykjast long hjá vónarfullum børnum. Teir fyrstu jólakalendararnir vórðu gjørdir úr pappi í 1920'unum eftir týskari fyrimynd. Í 1962 kom fyrsti u-landskalendarin, sum stuðlar børnum í triðja heiminum, og tað er her, at ein kemur við orsøkum til at kristindómurin kemur inn í myndina – hetta ynskið um at hjálpa næstanum. Siðurin at tvinna vælgerð saman við jólum kemur heilt aftur frá miðøldini, har fátæk og neyðstødd vórðu hjálpt meiri á jólum enn annars.
Danska sjónvarpið var kvikligt við jólakalendarum sínum. Fyrstu ferð var í 1962, har røðin "Historier fra hele verden" varð víst.

*(Kelda: kristendom.dk)*




















